Sosialurin

# VARPIÐ

F R Í G G J A D A G U R 2 1 . j a n u a r 2 0 0 5



**Føroyar 2:2**
Ein av fronsku sjónvarpsrásunum ger sendingar um fólkasløg runt um í heiminum, sum liva av tí, tey fáa úr sjónum. Í hesum sambandi var eitt franskt sjónvarpslið í Føroyum og gjørdi tvær sendingar um Føroyar. Hesar sendingar eru sera væl umtóktar í Fraklandi og liggja í bestu senditíð. Sendingin um Føroyar var víst í Fraklandi í fjør vár.
**Sunnudag 23. kl. 20.00**



**Mín mikro-makkari**
Flogskiparin Tuck Pendleton (Dennis Quaid) hevur meldað seg til eina vandamikla læknafrøðiliga roynd. Hann skal stýra einum fari, ið skal minkast niður til molekyl-stødd, sum síðan skal sproytast inn í eina kanin. Men, tá minkingin er farin fram, ræna brotsmenn royndarstovuna. Amerikanskur skemtifilmur frá 1987.
**Fríggjadag 21. kl. 20.00**

**Negermagasinet (1:13)**
Nú hava danir fingið møguleikan at hitta rættiligar nekarar. Her koma nekarar, og einans nekarar, til orðanna. DR setir sær fyri at siga donum frá um eina fremmanda mentan í Danmark, og at avdramatisera tað vandamikla orðið "nekari". Eitt avslappað og sjálvironiskt talkshow, vertirnir eru Vincent Byakika (28) og John Zulu (22).
**Hósdag 27. kl. 22.00**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**